# Kærleiksbræv Frá Pápa

**_Rópið frá einum faðirs hjarta frá 1. Mósebók til Johannesar Opinbering..._**

## Barn Mítt...

*Tú kennir meg kanska ikki, men eg veit alt um teg.* Sálmur 139:1 *Eg veit nær tú situr og nær tú stendur.* Sálmur 139:2 *Eg kenni allar vegir tínar.* Sálmur 139:3 *Sjálvt hvørt hár á høvdi tínum havi eg talt.* Matt. 10:29-31 *Tí tú vart skaptur í mínum bílæti.* 1. Mós. 1:27 *Í mær livur tú, rørist tú og ert til.* Ápl. 17:28 *Tí tú ert mín ætt.* Ápl. 17:28 *Eg kendi teg, áðrenn tú vart til í móðurlívi.* Jer. 1:4-5 *Eg valdi teg frammanundan, tá eg legði til rættis skapanina.* Ef. 1:11-12 *Tú var ikki ein feilur, tí allir dagar tínir eru uppskrivaðir í bók míni.* Sálmur 139:15-16 *Eg havi ásett tíðina fyri tíni føðing og hvar tú skalt búgva.* Ápl. 17:26 *Tú ert virkaður so ómetaliga undurfult.* Sálmur 139:14 *Eg havi vovið teg inn í móðurlívið.* Sálmur 139:13 *Eg havi ført teg til lívið, tann dagin tú vart føddur.* Sálmur 71:6 *Tey, sum ikki kenna meg, hava sagt ósatt um meg, givið eina skeiva mynd av mær.* Joh. 8:41-44 *Eg eri ikki langt burtur og vreiður, men eri tann fullkomna myndin av kærleika.* 1. Joh.br. 4:16 *Tað er mítt ynski at yviroysa teg við mínum kærleika, bara tí at tú ert mítt barn og eg eri faðir tín..*1. Joh.br. 3:1 *Eg kann geva tær meira enn jørðiski faðir tí nakrantíð kann.* Matt. 7:11 *Tí eg eri hin fullkomni faðirin.* Matt. 5:48 *Allar góðar gávur, sum tú fært, koma av míni hond.* Ják. 1:17 *Tí eg syrgi fyri tær og metti allan tín tørv.* Matt. 6:31-33 *Mín ætlan fyri framtíð tína er merkt av friði, og hevur altíð verið full av vón.* Jer. 29:11 *Tí eg elski teg við einum ævigum kærleika.* Jer. 31:3 *Mínir tankar um teg eru endaleysir, líka sum sandurin á strondini.* Sálmur 139:17-18 *Og eg gleðist yvir teg við sangi.* Zefaniasar bók 3:17 *Eg vil ongantíð halda upp at við at gera gott í móti tær.* Jer. 32:40 *Tí tú ert mín dýrabara ogn.* 2. Mós. 19:5 *Eg ynski at vaksa fram í tær, av øllum mínum hjarta og allari sál míni.* Jer. 32:41 *Og eg skal vísa tær tað, ið er stórt og undurfult.* Jer. 33:3 *Um tú søkir meg av øllum hjarta tínum, skalt tú finna meg.* 5. Mós. 4:29 *Gleð teg í mær, og eg skal geva tær alt, ið hjarta títt tráar eftir.* Sálmur 37:4 *Tí tað var eg, ið gav tær hesi ynski.* Fil. 2:13 *Eg megni at gera meira fyri teg, enn tú ert mentur at skilja.* Ef. 3:20 *Tí eg eri tín størsta troyst.* 2. Tess. 2:16-17 *Eg eri eisini faðir tín, ið troystar teg í øllum trongdum tínum.* 2. Kor. 1:3-4 *Tá hjarta títt er mótfallið, eri eg nær hjá tær.* Sálmur 34:19 *Sum ein hirði, ið ber seyðin, havi eg borið teg nær mínum hjarta.* Es. 40:11 *Ein dag skal eg turka hvørt tár, av eygum tínum* Opinb. 21:3-4 *og taka burtur alla pínu, ið tú hevur havt her á jørðini.* Opinb. 21:3-4 *Eg eri Faðir tín, og eg elski teg, líka sum eg elski son mín, Jesus.* Joh. 17:23 *Tí gjøgnum Jesus er kærleiki mín opinberaður tær.* Joh. 17:26 *Hann er ímyndin av mær.* Hebr. 1:3 *Hann kom fyri at vísa, at eg eri við tær og ikki ímóti tær.* Róm. 8:31 *Og fyri at siga tær, at eg ikki telji syndir tínar.* 2. Kor. 5:18-19 *Jesus doyði, so at tú og eg kundu gera sátt við hvønn annan.* 2. Kor. 5:18-19 *Deyði hansara var kærleiki mín til tín.* 1. Joh.br. 4:10 *Eg spardi ikki mín elskaða son,* Róm. 8:31-32 *so eg kundi vinna tín kærleika.* Róm. 8:31-32 *Um tú tekur ímóti gávuni, sum er Jesus, tekur tú í móti mær.* 1. Joh.br. 2:23 *Og einki skal aftur kunna skilja teg frá kærleika mínum.* Róm. 8:38-39 *Kom heim og eg skal gera eina veitlsu fyri tær, tann stórsta, ið himmalin nakrantíð hevur sæð.* Luk. 15:7 *Eg havi altíð verið faðir tín, og vil altíð vera faðir tín.* Ef. 3:14-15 *Mín spurningur er "Vilt tú vera mítt barn?* Joh. 1:12-13

*Eg bíði eftir tær.* Luk. 15:11-32

*...Kærar Heilsanir Pápi Tín –*

*Tann Almáttugi Guð*

Used By Permission Father Heart Communications Copyright 1999-2003 www.FathersLoveLetter.com Faroese FLL Translated by Finngerð Djurhuus Olsen